## DAGSINS MEINING

# Fleiri hall ber ikki til - tí má samfelagið endurskoðast!

Fíggjarlógin næsta ár fer aftur eitt hall á niðastu reglu. Tað sama ger seg galdandi í ár. Spurningurin er so, hvussu leingi kunnu vit hava hall á landsins búskapi? Spurningurin skal ikki svarast á hesum stað. Spurningin hava búskaparfrøðingar viðgjørt og tað fara teir eisini at viðgera í komandi tíðum. Vit seta bara spurningin.

Landsstýrissamgongan hevur valt at hava hall, tí fíggjarmálaráðið heldur, at tað fær størri og álvarsamari avleiðingar, um spart verður so nógv, at javnvág fæst á niðastu reglu á fíggjarlógini. – Vit hava valt at reka ein ekspansivan fíggjarpolitikk, segði Bárður Nielsen, tá hann legði fram uppskotið til fíggjarlóg fyri næsta ár síðst í september.

Við ein ekspansivan fíggjarpolitikk meinti hann óivað, at tað almenna táttar ikki í, tá talan er um íløgur. Fleiri íløgur standa fyri framman - íløgur í skúlar, ellis- og røktarheim, havna- og tunnilsgerð o.s.fr. Eftir útrokninginum hjá fíggjarmálaráðnum fór tað almenna ikki at hava færri fólk í arbeiði komandi ár.

Tað merkir kortini ikki, at nøkur ikki verða uppsøgd. Tað almenna sparir og fleiri stovnar eins og miðfyrisitingin hava verið noydd at siga nøkrum fólkum úr starvi, men sama tal av fólki skuldi kunnað fingið arbeiði, tí fleiri arbeiði í samband við nýíløgurnar.

Henda gongdin minnir um búskaparpolitikki hjá Keynes. Hann miðjar ímóti, at tað almenna skal halda aftur at gera íløgur í uppgongutíðum og tá búskaparstøðan er góð, tí tá eru privatu íløgurnar sum oftast stórar. Afturímóti skal tað amenna byggja út, tá tað privata vinnulívið heldur aftur. Á henda hátt fæst javnvág í.

Hesa støðuna eru vit fyri so vítt í, um vit ikki mistaka okkum, men ikki skerst burtur, at tá vit høvdu uppgongutíðir frá miðskeiðis í 90-árunum, og privati íløguhugurin var stórur, so gjørdu vit aftur - eins og í 80-árunum - ov stórar almennar í løgur.

Bara tey seinastu 5-6 árini hava vit bora ein undirsjóvartunnil, ein tunnil á landi, bygt nýtt landssjúkrahús, einar 6-7 havnir og ferjulegur, tvey nýggj strandfaraskip, eitt nýtt vaktar- og bjargingarskip, nýtt løgting, nýtt telefonverk, ein hóp av dagstovnum og harafturat hava eisini verið fleiri vegarbeiði.

Tað er ikki at siga ov nógv, um sagt verður, at nøkur av hesum arbeiðum kundu bíða ella verið toygd eitt ávíst áramál. Privati íløguhugurin var jú stórur, og tí kundi tað almenna hildið aftur og goymt pening til nú, tá privati íløgurnar eru rættiliga avmarkaðar, og tað almenna tíverri ikki hevur til nógv meira enn til tað sum tað kostar at reka samfelagið.

Hall í tvey ár, tilsamans 4-500 mió.kr., megna vit óivað at bera. Men í longdini ber tað ikki til, uttan at landskassaskuldin økist aftur, og tað ynskir eingin. Tí eiga landsins politisku myndugleikar longu nú - ella aftur nú - at fáa eitt veruligt arbeiði í gongd, hvussu vit kunnu rationalisera, soleiðis at føroyska samfelagið verður bíligari at reka!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fjølmiðlashow

**Eyðun Mohr Viderø**



Í seinastuni hevur verið rættuligt rok í Tjóðveldisflokkinum um levnaðin hjá Tobba, at hann alment í bløðunum hevur havt frammi rættuliga niðurgerandi vendingar um formann floksins, Høgna Hoydal.

Høgni kann sjálvsagt ikki finna seg í hesum, uttan so, at hetta er framhald av innanhýsis uppgerð í tingbólkinum, men tað sæst ongastaðni.

### Hvat man vera galið?

Okkara danskt skúlaða fólk hevur flutt inn mangar óneyðugar, vánaligar máliskur, og teirra millum finst, at »kemiin« er ikki í lagi!

Tað er nokk so stuttligt at hyggja at núverandi loysingarflokkinum. Hvørjar fyritreytin hava leiðararnir í mun til stovnararnar?

Tjóðveldisflokkurin varð stovnaður av skúlaðum føroyingum, sum komu aftur úr Danmark eftir seinasta heimsbardaga, og leiðarin Erlendur Paturson ynskti einar politiskt frælsar Føroyar, og í gerandisdegnum gjørdi hann seg eitt við fiskimannafjøldina í Føroyum. Og á hesum grundarlagi virkaði hann restina av lívi sínum. Samdur um virki hansara ella ikki!

Flokkurin og Erlendur vóru eitt, og tá hann fall frá, var flokkurin um at missa sítt tilverugrundarlag, tí: »ongin veruligur loysingarmaður var eftir, og heldur ongin veruligur fiskimannavinur«, so flokkurin datt nærum burtur í onki!

### Tá neyðin er størst…

Tilvildin ella lagnan lagaði tað soleiðis, at ein væltalandi blaðmaður hevði tilknýti til flokkin, og við sínum »manipolerandi« evnum gjørdist hann ikki bert tann lýsandi stjørna floksins, men hann vann flokkinum harumframt í atkvøðum fremsta plássið á Føroya Løgtingi. Avgerandi leikpartur hansara var blaðmansins nágreiniliga viðgerð og kanning av leikluti Dana í »Bankakreppuni«.

### Hvørji eru so avrikini

Undirritaði kennir persónin bert í tíðarskeiðinum, tá »sjálvstýrislandsstýrið« í 1990-unum tingaðist við donsku stjórnina um framtíðarstøðu Føroya, leysar ella partvís innan danska ríkið, men sum tað framgongur, so hevur Høgni í dag í neyðini ein láturverja, ið nevnist Sjúrður Skaale, at verja síni ómansligu evni í sjálvstýrisstríðnum, og hetta er sami maður, sum varð nýttur til yvir fyri fjølmiðlunum at umboða samgonguna í sjálvstýrisstríðnum, men sum bert í veruleikanum virkaði fyri at niðurgera Fólkaflokkin, tí annars kom fram, hvussu hjálparleysur Høgni Hoydal í veruleikanum var!

### Føðingarárið ikki avgerandi

Eg havi verið við til samkomu, har maður so fegin vildi strika undir, at tað vóru hundrað ár millum føðingarárið hjá slóðbrótandi »sjálvstýrishetjum« í Føroyum nevniliga: Nólsoyar Páll 1766, Jóanes Bónda 1866 og Høgna Hoydal 1966!

Tað er ikki nokk, at Høgni er ein væltalandi blaðmaður, og so at samanhalda hann við hetjuna Nólsoyar Páll og andsmennið og politikaran Jóanes Bónda! Men skal hann persónliga ferðast teirra millum, so skal hann vísa tað sjálvur uttan Sjúrð Skaale, og har vantar nógv!

### Kemiin

Sjálvstýrismaðurin Tobbi kann trívast í Tjóðveldisflokkinum, men vinnulívsmaðurin Tobbi hoyrir ikki heima har, og tí er hetta stríðið.

Líka mikið hvat hendir við útblakan av Tobba úr flokkinum ella ikki, men vinnulívsmaðurin Tobbi yvirlivir, meðan »tjóðarhetjan« Høgni hevur rættuliga avmarkaða tíð.

Óheft av innanhýsisklandri, so haldi eg, at Tobbi eisini er nógv meiri áhugaverdur!

Og fjølmiðlashowið eigur Høgni!

# Sjónvarp Føroya 10/11-12.2004

**Viggo A. Hansen**

Her situr man eitt kvøldið og bíðar, og klokkan er vorðin nógv. Men tástani vísir SVF, (samb. skránni), ein spenningsfilm.

Kaffi er til reiðar, og alt er klárt til at hyggja eftir filminum, sum skal byrja kl. 00.25, men hvat hendir - HONDBÓLTUR JUBIII - Onkur, (í SVF,) heldur, at hetta er tað besta av tí besta - So sektin í, hvat onnur halda. Eg hugsi við mær sjálvum, at tey møguliga hava broytt skránna - fari at kanna hetta á www.svf.fo, men nei, spenningsfilmurin stendur har framvegis. Eg veit ikki, um hann kemur aftaná, men so leingi ætli eg mær ikki at bíða.

Hetta er »Føroykst« so tað stendir eftir.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.